# Kringvarpið nýtt búmerki

**Kringvarp Føroya fær nýggjan grafiskan samleika. Myrkareyði sirkulin verður búmerkið hjá stovninum í framtíðini**

KRINGVARP
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Ongin ivi skal vera um, at talan er um Kringvarpið, tá fólk síggja búmerkið, ella bara ein lítlan part av tí. Á tíðindafundi týsdagin varð nýggja grafiska sniðið hjá samanlagda stovninum Kringvarp Føroya almannakunngjørt, og greitt varð frá, um tankarnar, sum liggja til grund fyri sniðinum. Sambært Kringvarpinum, skal nýggi grafiski samleikin eyðkenna sjónvarpsskíggja og heimasíður frá mánadegnum 6. mars 2006. Prentlutir, bilar og bygningar verða eisini ílatin nýggja sniðið so við og við.

Endamálið við at leggja stovnarnar saman 1. januar 2005, var at skapa betri fortreytir fyri rakstri, tænastu og programmútboði. Í samband við samanleggingina hevur tað higartil eydnast at fáa báðar umsitingarnar at virka sum eina felags eind.

Nú verður so farið undir næsta stigið í tilgongdini at leggja stovnarnar saman, og verður tað, fyri okkum lurtarar og hyggjarar, meira sjónligt og ítøkiligt, tí nú skulu øll hava eina felags ímynd, ella andlit, av samanlagda stovninum Kringvarp Føroya. Og her er talan um stórarbeiði, tá allir lutir, sum ímynda stovnin, skulu prýðast og prentast av nýggjum: bilar, brævbjálvar, brævpappír, sendiskráir, skelti, reklamutrailarar, fløgg og visitkort.

Sambært Repro Z, sum hevur staðið fyri at sniðgeva nýggja grafiska samleikan, hevur samanleggingin ført tvær sera ymiskar virkismentanir saman, sum nú skulu sameinast, og tí er tørvur á einum grafiskum samleika, bæði hjá starvsfólkum og viðskiftafólkum.




*Eftirgjørd mynd av nýggja búmerkinum á fasaduni á útvarpshúsinum*

Í grundgevingunum fyri nýggja samleikan, sigur ReproZ, at hann skal vera við til at skapa eina mynd av einum nýggjum miðlastovni. Hann skal fremja interna sameining og eksterna marknaðarføring og branding. Harumframt skal nýggi grafiski samleikin stuðla undir kjarnuvirðini: Trúvirði, óheftni, fjølbroytni og margfeldni.

**Búmerkið**

Um búmerkið sigur ReproZ, at við samanleggingini av Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya eru tvær sera ymiskar virkismentanir lagdar saman, og hesar skulu sameinast. Tí skal Kringvarp Føroya síggjast sum ein nýggjur miðlastovnur, og ikki sum

# Góð útlit fyri kringvarpshúsi í Sortudíki

**Stendur tað til Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann og Jógvan Jespersen stjóra í Kringvarpinum, verður útbyggingin av útvarpshúsinum til felags kringvarpshús veruleiki um fá ár**

KRINGVARP
*Rigmor Dam*
*Rigmor@rigmor.fo*

Í samband við samanleggingina av ÚF og SVF til nýggja stovnin Kringvarp Føroya, hevur nakað av práti verið um, at allur stovnurin skal húsast undir somu lon. Sostatt er greitt, at økið norðan fyri útvarpshúsið er keypt, og at Palle Gregoriussen, arkitektur, hevur gjørt eitt skitsuprojekt, sum landsstýrið tekur undir við. Nú er bert eftir hjá landsstýrismanninum at fáa løgtingið at taka undir við einum uppskoti um verklagslóg, sum vónandi verður lagt fyri tingið í vár, ella í øllum førum í ár.

**Vónandi longu í vár**

Jógvan Jespersen, stjóri í Kringvarpinum, sigur við Sosialin, at eftir samanleggingina fyri knøppum ári síðani, fóru tey undir at meta um hølisviðurskiftini hjá nýstovnaða Kringvarpinum.

– Fyri at fáa sum mest burtur úr samanleggingini, gjørdist tað beinanvegin greitt, at tað fór at vera týdningarmikið at savna alt virksemið undir somu lon. Tí settu vit ein bólk at gera eina tørvs- og kostnaðarmeting og eitt tilmæli til myndugleikarnar, sigur Kringvarpsstjórin. Og hann vísir á, at úrslitið av hesum arbeiðinum var, at leiðslan og arkitekturin handaðu landsstýrismanninum eitt skitsuprojekt, har heitt var á hann um at leggja eina verklagslóg fyri tingið.

– Eg veit, at landsstýrismaðurin hevur havt skitsuprojektið fyri á landsstýrisfundi, og haðani hevur hann fingið heimild at arbeiða víðari við verkætlanini, sigur Jógvan Jespersen, sum nú sigur seg bíða eftir, at málið skal vera lagt fyri, og samtykt av tinginum.

– Vit vóna, at landsstýrismaðurin leggur uppskotið um verklagslóg fyri tingið í vár, so vit kunnu brúka restina av hesum árinum til at fyrireika eina fysiska samanlegging. Síðani kundi eg hugsað mær, at vit brúktu tey næstu árini til at útbyggingar uppi í Sortudíki, og at hølistrupulleikarnir vórðu loystir um eini 3 ár, í 2009, greiðir Jógvan Jespersen frá.




*Her er onnur skitsumyndin, sum J. P. Gregoriussen, arkitektur hevur gjørt. Hetta er bert ráskitsa og skal ikki takast fyri meira enn tað*

**Vørðslan ótíðarhóskandi**

Hølisumstøðurnar hjá sjónvarpinum eru út av lagi vánaligar, og nú er stovnurin farin undir at endurnýggja nógva tekniska útgerð.

– Tí hevði verið gott at fingið eina ábending um nær, og um, myndugleikarnar ætla at lívga um okkum. Stovnurin húsast í fimm ymsum húsum, bæði sethúsum og handilsbygningum. Um vit hugsa okkum, at vit fáa nakað av peningi fyri at selja tær fýra ognirnar, sum SvF eigur, so ikki so nógv verður eftir hjá tí almenna at rinda, sigur Jógvan Jespersen. Og hann sigur seg meta, at kostnaðurin fyri útbyggingarnar, sum fevna um 4000 fermetrar, fer at liggja um 40 milliónir, áðrenn møguligar sølur er frátiknar.

**Sigur tú A..**

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, játtar fyri Sosialinum, at hann hevur havt málið um skitsuprojektið fyri á landsstýrisfundi, og at hann har fekk heimild til at arbeiða víðari við málinum.

– Lá tað til mín, so var málið avgreitt longu í vár, ella í øllum førum í ár, so farast kann undir at byggja. Tí, sigur tú A, mást tú eisini siga B, og tað er púra natúrligt, at útvarpið og sjónvarpið húsast saman, nú vit hava lagt stovnarnar saman, sigur landsstýrismaðurin.